


# Oljufeløg lata loyvi innaftur

**Jan Müller**

26.01.2014 - 20:10

Oljan.fo

Tey koma og fara – leitiloyvini á føroyska landgrunninum. Fyri góðum ári síðani mundu tað vera fleiri enn 10 leitiloyvi á føroyska landgrunninum. Í dag er talið minkað niður í seks.

Jarðfeingi boðar nú frá, at Loyvi 009, sumvarð latið 17. januar 2005, varð latið inn aftur 16. januar í ár

Kanningar eru gjørdar av loyvisøkinum, men úrslitini hava ikki eggjað loyvishavarunum at halda fram við kanningunum, og hava teir tí avgjørt at lata loyvið aftur.

Loyvishavarar vóru: Statoil (fyristøðufelag), Exxon Mobil og OMV.

Somu feløg hava tó saman við Atlantic Petroleum júst søkt um loyvi at bora í grannalagnum, á Brugdan 2 leiðini.

Kelda Jarðfeingi

